Nógv minni virksemi á fiskavirkunum

Tað gongur skeiva vegin í fiskivinnuni á landi. Hagtøl vísa, at fyrstu fýra mánaðirnar í ár var útgjaldið úr serligu fiskavirkisskipanini hjá ALS dupult so stórt sum somu tíð seinasta ár

FISKIVINNA
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Nógv minni virksemi hevur verið á fiskavirkunum kring landið fyrstu fýra mánaðirnar í ár í mun til sama tíðarskeið í fjør. Nógv fleiri fólk fáa lønarendurgjald úr serligu fiskavirkisskipanini hjá ALS

savnsmynd

Mangan verður sagt, at tað er støðan í fiskivinnuni, sum er altavgerandi fyri, hvussu tað gongur í føroyska samfelagnum. Um vit skulu trúgva hesum spádómi, so gongur tað einki serligt í løtuni, tí arbeiði er nógv minkað á fiskavirkunum kring landið.

Nógv fleiri fólk fáa lønarendurgjald

Vinnuhúsið hevur hugt at útgjaldshagtølunum hjá serligu fiskavirkisskipanini hjá ALS, og út frá teimum verður mett, at útgjaldið úr skipanini er tvífaldað fyrstu fýra mánaðirnar í ár í mun til somu tíð seinasta ár.

Serliga fiskavirkisskipanin hjá ALS varð sett á stovn, so at arbeiðsfólk á fiskavirkunum kring landið kundi fáa lønarendurgjald, tá ið einki arbeiði var á virkinum. Tøl hjá ALS vísa, at til dømis fingu ikki færri enn 600 fólk stuðul úr skipanini í marts í ár, meðan talið seinnu árini vanliga hevur ligið um tey 200.

Á aðalfundinum hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag herfyri vóru bæði alivinnan og fiskivinnan umrøddar, og aðalfundurin staðfesti, at umframt stóru afturgongdina í alivinnuni, eru fiskavirkini eisini komin í trupulleikar, stendur at lesa á heimasiðuni hjá Vinnuhúsinum. Sum tey flestu óivað vita, hava alarar her á landi verið meint raktir av sjúkum fiski, og harafturat hevur prísurin fyri laks verið í botni í langa tíð.

Hjá fiskavirkunum hevur trupulleikin serliga verið, at eingin vinningur liggur eftir, tá ið fiskurin fer av landinum, og tí hava fleiri virkir valt at havt minni virksemi enn vanligt. Ein annar trupulleiki hevur verið, at fleiri láglønarlond eru farin at arbeiða fisk, og tí eru prísirnir á marknaðinum lágir, og føroysku virkini hava ilt við at kappast við hesi lond.

Skilja ikki metingarnar hjá fíggjarmálaráðnum

Á heimasiðuni hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo, verða viðmerkingar gjørdar til gongdina í fiskivinnuni. Eisini ger Føroya Arbeiðsgevarafelag viðmerkingar til metingarnar hjá fíggjarmálaráðnum herfyri, har sagt var, at afturgongdin í føroyska búskapinum var við at steðga. Arbeiðsgevarafelagið vísir á, at sambært einum fjølmiðli, segði landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Bárður Nielsen, at inntøkur landskassans fóru enntá at vaksa eitt sindur komandi ár. Hvat búskaparfrøðingarnir hjá fíggjarmálaráðnum grunda sínar bjørtskygdu metingar á, dugir Føroya Arbeiðsgevarafelag illa at skilja, tí sambært teimum eru tekin bert um, at tað gongur tann skeiva vegin.

Hósvíkingur fór í knús

Á vegnum út á Skála til kappróður á fyrsta sinni hendi eitt óhapp, sum hevði við sær, at spildurnýggja seksmannafarið hjá hósvíkingum fór í knús. Tíðindini um óhappið bórust skjótt út á Skála, og mundi tað neyvan vera ein rógvari, sum ikki dugdi at seta seg inn í støðuna hjá manningini á Hósvíkingi hendan dagin

ÓHAPP
Solby A. Eliasen
solby@sosialurin.fo

Seksmannafarið Hósvíkingur fekk stóran skaða eftir óhappið millum Fjarða sunnudagin

Mynd: Jens K. Vang

Millum Fjarða beint yvir av innkoyringini til Funningsfjørð tók ein hvirla seksmannafarið Hósvíking og vognin, sum hann stóð væl surraður uppí á, av vegnum. Fylgjurnar vóru ræðuligar fyri teir sjey rógvararnar, sum hava vant nógv og dúgliga seinastu mánaðirnar, felagið og alt sundalagsfólk.

Báturin fór stutt sagt í knús, verður sagt úr Hósvík. Ein av rógvarunum, Jens Kristjan Magnussen sigur, at báturin er farin rættuliga illa. Tey hava verið í sambandi við Sámal Hansen, bátasmið, og hann sigur, at tað neyvan loysir seg at gera hann aftur.

– Hetta er ein dyggur smeitur fyri okkum, tað kanst tú ætla. Báturin var spildurnýggjur, og vit hava bert vant í honum. Hann var eingongd ikki ordiliga klárur. Har manglaðu fótalunnar og annað framvegis, greiðir Jens Kristjan frá.

Tosaðu um tað áðrenn

Jens Kristjan sigur, at onkur hevði tað á munni, áðrenn farið varð úr Hósvík, at bara nú báturin ikki fór at fúka.

– Vit droymdu ikki um, at hatta kundi henda. Hóast tað varð nevnt, áðrenn vit fóru avstað. Men bæði vognur og bátur vóru ov løtt, so hvirlan hon skrykti tey bæði leys av bilinum, langt upp frá og so brast kjølurin niður í, greiðir Jens Kristjan frá.

Nakrir av manningini koyrdu beint aftan fyri, tá óhappið hendi. Jens Kristjan sigur, at ein teirra var róðursmaðurin. Tað var ein stórur skelkur fyri teir at síggja teirra flotta og nýggja seksmannafar verða rykt uppfrá vegnum í einari hvirlu.

Sum skilst gerst báturin helst ikki aftur. Stavnurin har afturí á bátinum er knekkaður, gronin er øll farin sundur, sum hon er og har til hevur kjølurin, har tað brast, eisini fingið skaða. So Jens Kristjan og hinir seks umborð á Hósvíkingi vænta ikki, at hann verður gjørdur aftur. Men tað er ein tryggingarspurningurin, verður sagt.

– Tað er sjálvandi sera harmiligt, tí fleiri av okkum hava tosað um, at hetta nú skuldi verða okkara seinasta ár í kappróðri. Og so við nýggjum báti afturat, men tað bleiv av ongum, sigur hann og leggur afturat, at tíbetur var báturin tryggjaður. Men tað er ikki nakar stórur uggi fyri manningina, sum nú er.

Læna annan bát

Jens Kristjan sigur, at nevndin í felagnum fer nú at arbeiða við møguleikum um at læna ein annan bát. Hann veit, at tað møguliga kann standa teimum í boði at rógva í einum nýggjari báti til stevnurnar og so bara venja í einum gomlum. Men onki er avgjørt enn.

– Hatta er nakað, sum nevndin hjá okkum fer at taka sær av, og so fáa vit at síggja, sigur Jens Kristjan Magnussen, sum saman við hinum báðum kollfirðingunum og teimum fýra hósvíkingunum fyribils er farin aftur á land av venja.

Nýggj framsýning um eldgos, frumskóg og ístíð í Føroyum

Einaferð vóru Føroyar eitt meginland við tropiskum frumskógi og eldgosum. Hvussu bleiv hetta landið til, og hvussu broyttist tað til tær fjarskotnu, brøttu oyggjarnar, sum vit kenna í dag?

UPPHAV FØROYA

Hendan hugtakandi søgan verður lýst í nýggju framsýningini, sum hevur heiti Upphav Føroya. Her verður greitt frá, hvussu Føroyar vóru bygdar upp av eldgosum fyri 60 milliónum árum síðan, fyri síðan komandi nógvu milliónir árini at broytast fullkomiliga aftur. Søgan fevnir so vítt sum frá eldgosum á meginlandi til ístíð í fjarskotnum oyggjum.

Hetta er tann størsta framsýningin, sum seinnu árini hevur verið gjørd um Føroya jarðfrøði. Steinar, grót og stórar myndir eru við til at lýsa samansettu søguna um, hvussu Føroyar vóru til, og lív kemur í søguna við ljóðum frá brakandi grótbræðingum og skorðdýrum í frumskógini.

Nýggja framsýningin hjá Jarðfrøðisavninum Upphav Føroya er í hølunum hjá Náttúrugripasavninum á Debesartrøð. Í framsýningarhølunum annars eru framsýningar um føroysk steinsløg, hvalir, fiskar, fuglar og blómur.

Framsýningarnar eru opnar hvønn dag fram til miðjan september.

Nýggj barnafløga á marknaðinum

FLØGUÚTGÁVA
tíðindaskriv

Heimamissiónsforlagið (HMF) hevur júst givið út eina nýggja barnafløgu. Fløgan eitur »Jesus elskar meg«. Tað er Jón Magnus Joensen, ið hevur samskipað og eigur orð og løg til hesa fløgu. Súsanna Hansen, sála, Tvøroyri, hevur tó gjørt tekstin til sangin »Skaparin og skaparaverkið«. Hetta er onnur fløgan hjá Jón Magnusi. Hin fyrra kallast »Í staðnum Nasaret«.

Á fløguni eru 16 sangir - allir glaðir, sera sangbærir og rútmiskir. Tónleikurin er sera nútíðarkendur og fangar børn og ung. Fløgan er eisini ætlað hesum. Tónleikararnir, Regin Toftegaard og Hans Poulsen, hava gjørt tónleikin sera hegnisliga. Regin Toftegaard hevur tikið upp røddir hjá Alexandur Gaard Joensen.

Tey, ið syngja á fløguni eru: Beinta Olsen, Beinta Haraldsen, Katrin á Borg Gaard, Marjun Petersen, Ruth Thomasen, Jonn Lydersen og Jens Súni Hansen. Myndir hevur Amy Hansen tikið, og layout eigur Petur Hansen.

Fløgan kostar kr. 169,00 og kann keypast frá HMF og í handlum runt um í landinum.